# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og um middagsleitið regn, annars sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og eitt skifti regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, men sunnudagin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

# - Føroyingar elska sítt land

*Morten Josefsen, ella Robinson-Morten, var mánadagin ríðitúr við Berg-hestum, og Sosialurin fekk eitt prát við hann eftir túrin*



*Morten Josefsen eftir ríðitúrin við Berg-hestum*

STEFAN Í SKORINI

- Tað er nakað hugtakandi við náttúruni her í Føroyum, sigur Morten Josefsen, tá ið hann varð spurdur um, hvussu honum dámdi Føroyar.

Morten var, sum áður nevnt, ríðitúr í gjár, og so hevur hann eisini verið undir Vestmannabjørgunum. Hann sigur eisini, at tann føroyska náttúran er eitt sindur ræðandi, við tað at hon er ógvuliga ráð og ber.

Um føroyingar sigur hann, at hann hevur verið sera væl móttikin og hevur ikki møtt einum negativum persóni. Fyrireikararnir hava eisini gjørt eitt gott arbeiði, so at vit hava følt okkum væl her, leggur Morten afturat.

- Tit føroyingar elska tykkara land, og eg skilji á lagnum, at her er nóg mikið at síggja, tí hevði tað verið upplagt at komið aftur sum ferðamaður og sæð meira av Føroyum enn hesuferð.

Morten hevur havt møti hvørt kvøld, hann hevur verið í Føroyum, og tí hevur hann ikki sæð so nógv av Føroyum, sum hann kanska kundi ynskt. Seinasta møtið verður mikukvøldið, og hann fer aftur til Danmarkar longu hósdagin.

**Væleydnað møtir**
Møtini, sum hava verið í ítróttarhøllini á Hálsi og í Meinigheitshúsinum í Havn, hava eydnast sera væl, sambært Morten Josefsen.

- Vit hava havt nøkur sera góð møti, og nógv fólk hava verið øll kvøldini.

Morten talar kanska mest til ung fólk, men hann sigur, at hóast hetta so hava tey eldru ikki verið negativ yvirfyri honum, men tey hava eisini verið opin fyri boðskapinum.

- Vit hava eisini upplivað at nøkur fólk eru vorðin grødd á møtunum, og nøkur hava tikið ímóti gleðiboðskapinum, so móttøkan frá áhoyrarunum hevur verið sera góð, sigur Morten.

**Ætlar at verða prestur**
Morten Josefsen lesur í løtuni teologi og ætlar einaferð at gerast prestur. Hann hevur tó ongar ætlanir um at broyta stíl, um hann gerst prestur.

- Eg ætli mær ikki at broyta meg sjálvan, so um eg gerist prestur, ætli eg mær at halda fram við tí sama boðskapinum.

Hann leggur afturat, at hetta liggur langt frammi í tíðini, og tí er tað torført at siga nakað um hetta enn.

**Robinson Ekspeditiónin**
Um Robinson Ekspeditiónina sigur Morten, at hann kom at kenna seg sjálvan betri og breyt nøkur av sínum mørkum.

- Vit vóru sekstan heilt ymisk fólk úti á oynni, og eg kom at kenna nakrar aðrar lívsáskoðanir enn mína egnu betri, og tað hevur verið gott fyri meg sum persón.

Morten hevði bíbliutíma ella undirvísing týskvøldið í Meinigheitshúsinum, og mikukvøldið kl. 21 er hann í KFUM og K í Klaksvík, har han fer at hava eitt møti, sum minnir um tey uppi á Hálsi.




**Í gjár:**
Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Íslandi fer eystureftir og gevur óstøðugt veður teir fyrstu dagarnar.




**Hitalagið mált frá 10./07. kl 06⁰⁰–11./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 10./07. kl 6⁰⁰–11./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: 13,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John‘s | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 14 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannahavn | 13 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 15 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 6 |

## Vestfalskyrrindi

8. juli: Fyrra kvarter
15. juli: Mánin longst frá jørðini
16. juli: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juli | 4.09 | 16.34 | 3.09 | 15.34 | 3.24 | 15.49 | 6.09 | 18.34 | 7.09 | 19.34 | 2.24 | 14.49 | 1.24 | 13.49 | 4.24 | 16.49 | 5.24 | 17.49 | 3.54 | 16.19 | 5.09 | 17.34 |
| 13. juli | 5.00 | 17.24 | 4.00 | 16.24 | 4.15 | 16.39 | 7.00 | 19.24 | 8.00 | 20.24 | 3.15 | 15.39 | 2.15 | 14.39 | 5.15 | 17.39 | 6.15 | 18.39 | 4.45 | 17.09 | 6.00 | 18.24 |
| 14. juli | 5.47 | 18.08 | 4.47 | 17.08 | 5.02 | 17.23 | 7.47 | 20.08 | 8.47 | 21.08 | 4.02 | 16.23 | 3.02 | 15.23 | 6.02 | 18.23 | 7.02 | 19.23 | 5.32 | 17.53 | 6.47 | 19.08 |
| 15. juli | 6.29 | 18.49 | 5.29 | 17.49 | 5.44 | 18.04 | 8.29 | 20.49 | 9.29 | 21.49 | 4.44 | 17.04 | 3.44 | 16.04 | 6.44 | 19.04 | 7.44 | 20.04 | 6.14 | 18.34 | 7.29 | 19.49 |

Kelda: Skipalistin 2000

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg